


# Mouritz Mohr: Góð tíðindi fyri PAM Offshore Service

**Jan Müller**

08.06.2015 - 16:15

Oljan.fo

"Hetta er at frøast um og eru tað sera góð tíðindi fyri okkum, nú vit hava arbeitt fyri Kværner í fleiri ár og somuleiðis hava ein rammusáttmála við hesa stóra norsku veitingarfyritøkuna."

Hettta sigur Mouritz Mohr, stjóri á PAM Offshore Service við oljan.fo, nú tað eru stórtíðindi í norska oljuídnaðinum, at norska fyritøkan Kværner hevur fingið ein stóran bita av fyrsta byggistigi av einum av heimsins størstu oljuútbyggingum, nevniliga oljufeltið Johan Sverdrup. Tað er Statoil, sum er fyristøðufelag fyri hesa útbygging.

Føroyski skipasmiðjustjórin sigur, at teir eru klárir til nýggjar uppgávur í Norra í framtíðini eisini. Kværner hevur verið ein av størstu kundunum hjá PAM Offshore Service og er

seinasta hond júst løgd á tvær stórar verkætlanir, sum Kværner hevur staðið fyri, eitt nú Edward Grieg verkætlanin. Kværner hevur aðrar uppgávur fyri framman, og nú kemur Johan Sverdrup so aftrat.

PAM hevur í løtuni umleið 130 mans til arbeiðis í Norra. Tá mest var at gera vóru har einir 250 mans. Men hetta er so tíðin, har fleiri stór arbeiði eru um at vera liðug